## MÁLTEIGURIN

### *Við rutuni á leiðini*

Eg hvøkki við, hvørja ferð eg síggi ein buss, sum við stórum stavum framman kunnger: IKKI Í LEIÐ.

Hetta er málspilla við lít. Øll, sum kenna nakað til skúla, vita, at tað er líka lætt at læra tað skeiva sum tað rætta. Tað er tí ein gáta, hví myndugleikarnir skulu brúka sakleysar bussar til at banka skeivt málbrúk inn í fólk. Tað eitur og hevur altíð itið Á LEIÐ á føroyskum. Eingin føroyingur hevur nakrantíð verið í leið.

Teksturin er helst ein umseting av tí danska IKKE I RUTE. Men so mátti tað á føroyskum itið IKKI Í RUTU.

Orðið leið er nakað heilt annað enn ruta. Ein ruta er tað strekkið, sum ein bussur ella skip røkir fyri at fólk og farmur skulu koma fram. Soleiðis hevur orðið verið brúkt í minst hundrað ár, og vit hava nógvar samansetingar við rutu-. Til dømis rutubátur, rutubilur, flogruta, fara/koma/senda við rutuni, ringja til rutuna osfr. Hetta eru orð, sum hava fest seg í málinum, og tey kunnu ikki bara avloysast av *leið*.


Orðið leið hevur tveir høvuðstýdningar: a) tann beinleiðis, fysiska týdningin: teinurin millum tvey støð, og b) tann yvirførda týdningin, sum vit síggja í orðum sum lívsleið, leiðin til undirgang osfr.

Við at troka LEIÐ inn fyri RUTU uppnáa vit at skaða allar hesar upprunatýdningarnar. »Ljós á leiðini« verður so hildið at vera gøtulyktirnar fram við vegnum, sum rutan koyrir. Einaferð var ein filmur, sum æt »Rutebil på afveje«. Tað skuldi so blivið »Leiðbilur av leið« á føroyskum. Vit hava nógvar máliskur við *leið*: á einari leið, á beinari leið, á góðari leið osfr. Tað vil siga, at orðið LEIÐ er upptikið, fullsett av einari rúgvu av týdningum og máliskum, og at hesar máliskur ikki tola, at ein nýggjur og óviðkomandi týdningur verður kroystur inn í orðið.

Latið leið vera leið og rutu vera rutu. Tað er ikki gott fyri nakað at flyta runt við fólksins orðum! Vit kunnu vita, hvussu úrslitið verður, um vit seta RUTU inn fyri VEG hjá Matteusi 7,13–14 og siga, at tann rutan er breið, sum førir til undirgang, og at tann rutan er smøl, sum førir til lívið. Hetta ljóðar ikki væl, og vit høvdu heldur ikki kunnað sagt, at tað var leiðin, sum var breið ella smøl.

Tað førir ikki til málsins undirgang, at bussarnir koyra runt við hjálparleysum tekstum. Men tað avdúkar at tankagongdin aftanfyri kanska ikki er so breið.

S





## KROSSORÐAGÁTA

**Vinnari: Brian Jacobsen, Rúnarvegur 620 Runavík**

## Loysnin frá seinastu viku

**Loysunarorðið: Samfelagsognin**



**Hvønn leygardag**

verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið »**Krossorðagáta nr.** ____« á bjálvan.

Loysunarorð: ..... 72

Navn .....

Bústaður .....

Bygd/býur .....


*Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!*

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

*Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.*

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR

**GRAVSTEINAR & KANTSTEINAR**



**GRAVSTEINAR frá kr. 4.200,-**
**KANTSTEINAR frá kr. 550,-/m**
**SÍÐUR w/SKOYTI frá kr. 800,-/m**

*Vit senda príslista við litmyndum*

**Síggið framsýning okkara í Runavík og í R. C. Effersøesgøtu 19 í Havn. Ringið og avtaliðtíð**

**DANSTEIN**
**Runavík - Tórshavn**
**Tlf. 47512 - 18323 - 88050 - 84512**
☆ *Svarar eisini eftir arbeiðstíð* ☆